## Eitt 75 ára minni:

# Immanuel og Laura ganga burtur



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**Náttin millum 9. og 10. Apríl 1932 man vera ein tann daprasta nátt í Føroya søgu. Tað var eftir øllum at døma hesa náttina, at sluppirnar Immanuel og Laura gingu burtur við tilsamans 38 monnum, tá teir vóru á veg heim av Suðurlandinum. Í hesum døgum eru tískil 75 ár liðin síðan hesa døpru hending, sum vit vilja minnast hesa ferð í Miðvikuni.**

Hetta er ein hending, sum er væl kend, og sum rættiliga nógv er skrivað um. Hetta verður tískil ein samandráttur.

Ein týðandi kelda er bókin hjá Erlingi Poulsen: "Laura, Immanuel og Aldan ganga burtur", sum kom út í 1992 Erling gav mær sjálvum standandu loyvi at nýta sínar bøkur sum keldur, og nú Erling er deyður, skal hann hava tøkk fyri tey íkøst, sum hann við sínumn bókum gav okkara fiskimannasøgu.

Aðrar keldur eru frásagnir í FF-blaðnum frá Andrias í Tarti, Andrew Godtfred, Eliesar Sørensen og Miu Mikkelsen, sum var seinasta einkjan eftir teimum, sum fórust við Immanuel. Afturat hesum hava vit tosað við Dávur Jacobsen, sum var sonur ein teirra, Per Jacobsen, sum fórst við Immanuel. Hann er 80 ára gamal og minnist tískil hesar hendingar.

## Veðrið var øgiligt

Veðrið hesa náttina, tá hildið verður, at skipini gingu burtur, var tiltikið vánaligt.

Eg havi tosað við tríggjar gamlar fiskimenn, sum minnast hetta veður, og skulu allar hesar frásagnir verða endurgivnar í høvuðsheitum. Hóast talan er um sama veður, so supplera hesar frágreiðingar hvørja aðra.

**Eliesar Sørensen, ættaður av Kirkju, skipari á "Coronet":**
Eg minnist sera væl hesa sorgarhending, tí vit sóu "Immanuel" uttanfyri okkum sjálvar fara eystureftir beint uppundir ta ódnina, sum helst gjørdist banin hjá hesum báðum skipum og teirra manningum. Eg minnist, at tað var heilt nógvur fiskur at fáa, og "Coronet" lá fløt av fiski. Eg minnist eisini, at "Svínoyggin" kom uppá prei. Veðrið var gott tá, men eg minnist ikki at hava sæð barometrið fallið so skjótt, so tað var alt, sum bendi á illveður. Eg gav boð um at hála loddini inn og so at fara at reinsa.

Skjótt byrjaði illveðrið, og vit mistu fisk av dekkinum, og vit fingu seglið yvirstak. Fyri at bjarga fiskinum máttu vit koyra part av honum í forlastina óflaktan, og sigur hetta nakað um, at støðan varð mett at vera álvarslig.

"Coronet" kom heim í øllum góðum, og tað sama gjørdi "Svínoyggin".

**Andrew Godtfred, ættaður úr Vági, við "Norðfarinum".**
Eg hevði gingið ein vetur á motorpassaraskúla, og kundi nú vera smyrjari við "Norðfarinum". Tað var hetta árið, tá "Laura" og "Immanuel" gingu burtur við mann og mús.

Vit høvdu verið heima – fóru heim 23. mars 1932 við 700 skippundum, og vit vóru á veg yvir aftur til Íslands. Veðrið var framúr vánaligt. Eg var staddur í maskinrúminum og hevði júst fingið lensupumpuna at taka við aftur aftaná, at hon hevði verið typt av træspønum, sum komu í ventilarnar, og sum stavaðu frá byggingini av skipinum, sum var nýtt.

Tá fingu vit ein slíkan sjógv, at eingin kloddi var eftir á skipinum uttan miðseglið. Tað brast so hart í henni, at onkur helt, at síðan var sligin inn, og at vit fóru at søkka, men so galið var tað kortini ikki.

Brotið slongdi skipsbátin tvørtur um skipið og til sjós, og sprongdi í ferðini lúnningarnar uppav. Øll skottini stóðu í lastini, men saltið var tveitt yvir í annað borðið, so skipið fekk slagsíðu. Í lastini var ein tóm krubba, og har stóðu allir spakarnir. Tóma krubban var nú fylt við salti, so fólkið mátti fara í lastina við tallerkum, pottalokum, fjalum og berum hondum fyri at fáa skipið á rættkjøl aftur. Skaðin á hetta, bert trý ára gamla skip, var so stórur, at vit vendu við og fóru heimaftur.

Eitt brot kom afturat, sum legði "Norðfarið" skerflata, og tá væntaðu vit ikki, at hon reistist aftur. Stórseglið fyltist við sjógvi og helt lúnningini í vatnskorpuni. Tá gjørdi Magnus Veihe í Porkeri tað bragd, at hann fór við lissu um miðjuna út á seglið, har tað lá niður í sjógvin, og við flekiknívi fekk hann skorið hol á seglið, so sjógvurin rann út, og skipið rættaði seg aftur.

Stýrihúsið fór ikki, men allir rútarnir fóru. Tað var ein kappi í maskinrúminum upp í stýrhúsið, og nógvur sjógvur kom niður, og tveir fjalir av dúrkinum í stýrihúsinum komu sendandi niður í maskinrúmið. Men lukkutíð raktu tær ikki oljurørið og motorurin steðgaði ongantíð.

"City" og "Havgásin" vóru eisini á hesum leiðum, men eg veit ikki um onnur skip. Tey vendu eisini aftur vegna skaðan, tey fingu í illveðrinum. Eg havi annars hoyrt, at "Immanuel" hevði ein stakk av fiski á dekkinum. Skipini vóru nevniliga á veg heim og vóru tískil tung í sjónum. Vit vóru betri fyri við tómum skipi.



*Hjúnini Thorleif og Nicolina Justinussen eiga hvør í sínum lagi part í okkara fiskimannasøgu. Pápi Thorleif, Ísak, var við Ernestinu lagnutúrin í 1930, men hann slapp tó við lívinum.*
*Nicolinu var fødd 16.februar og var nærum nýfødd, tá hon misti pápan, Niklas Lassen, og pápabeiggjan Niels við Lauru. Hon varð doypt 27.mai og varð uppkallað eftir pápanum. Niklas hevði grundað fyri húsum, men so stórt var hjálpsemið, at menn í bygdini sjálvboðnir smíðaðu henni húsini liðug. Ella, kona Niklas, mátti lívbjarga sær við at arbeiði í fiski.*

**Andrias í Tarti úr Oyndarfirði, við Sæborg**
Greiðir frá túri við Sæborg og heldur fram: Hetta var sama túr sum Laura og Immanuel forlistu. Vit høvdu fiskað 22.000 fiskar og skuldu heim. Vit vóru væl mannaðir, yvir 22 mans. So nógvar koyggjur hevði hon ikki, so her vóru eisini tvímanskoyggjur. Nú er tað so, at vit praja "Lauru" av tí, at maskinmeistarin á Lauru, Niclas, hevði verið árið frammanundan við einum motorbáti, sum bleiv leigaður til Oyndarfjarðar, og sum kallaðist "Føroyingurin", og tí kendu oyndfirðingar hann so væl. Eg meini, at skiparin sjálvur, Hans Jacob Abrahamsen, tosaði við hann. Tá hevði "Laura" 18.000 fiskar inni. Hon var ein lítil slupp. "Sæborg" hevði 22.000 fiskar. Vit koma heim eitt fríggjakvøld, leygarmorgunin fara vit at landa í allarfínasta veðri í Oyndarfirði, og vit tøma skipið, 400 skippund, eftir einum leygardegi. Skipið varð so fortoyað fyri báðum ankarum. Eg tørni inn. Harra Jesus, eg verði vaktur tíðliga sunnumorgun at koma umborð. Tá er stormur og kavarok, og "Sæborg" var farin í drift. Bjargingarbáturin er í landi. Tað var ikki øll manningin, sum var úr Oyndarfirði. Eg minnist ein mann, Sofus Rinkustein, sum skiparin mátti biðja afturat at hjálpa til. Báturin varð vendur í støðni, og 6 mans sótu til árar. Tað var akkurát, so vit kláraðu at koma út frá. Vit passaðu okkum løgi millum glaðurnar, so tað lukkaðist okkum at koma umborð og at fáa motorin í gongd. Tað sum var leyst á dekkinum, tað feyk alt. Kokkurin hevði sett bakkar og tílíkt upp, tað var alt farið til sjós. Tað eydnaðist so at fáa skipið fortoyað aftur, sum tað skuldi.

"Silver Lining" var komin á Mýling, tá hann bresti á. Reiðarin og skiparin Justines Eidesgaard var ein maður, sum legði nógv fyri. Men ikki hættaði hann sær at fara í Djúpini. Hann fór vestur í Vágahavið. So ringt var hetta veðrið, tá "Laura" og "Immanuel" eru farnar. Eg eri klárur yvir, at vit eru eitt tað seinasta skip sum hevur tosað við "Lauru".

## Um Lauru

Laura var keypt úr Onglandi í 1896, og í 1932 áttu teir á Tjørn í Vági hana. Hon fekk motor í 1930, tá nógvar sluppir fingu motor ísettan.

Seinasta skipið, sum sá Lauru var Vágbingur, sum teir á Tjørn eisini áttu. Laura preiaði Vágbing kl. 4 seinnapartin 7. apríl og spurdi, um teir kundu fáa eit fat av olju. Báturin á Vágbingi hekk afturút, og motorpassarin, Vinther Lauritsen úr Seyrvági, fór umborð í Lauru at hitta systkinabarnið